# Kvøða til fólkabókasøvnini

*Suzanne Brøgger*

I

Sum barn vildi eg verða bókavørður
júst sum skótaleiðarin, ið æt Hugsa,
og sum brúkti varralit.

Hugsa tær, at verið bókavørður,
sum setti allar bøkurnar upp á pláss
sum visti, hvar ið tær vóru,
so hevði tú vitað,
hvør tú var - bókavørður
við varraliti.

At verið bókavørður
og vita, hvar bøkurnar standa
og hvat stendur í teimum
og kunna siga, at hetta ævintýrið skalt tú lesa.
At vera bókavørður við einum stempulblýanti
og einari lítlari stempulpútu og einum stempli
í einum lítlum fýrakantaðum formi,
sum líkist einum rúti og geva bót
upp á fimmogtjúgu oyru
og vísa øllum
hvussu havsbrúgvin sær út.

II

At koma á eitt bókasavn og síggja
bøkurnar standa á vognum á hjólum
minnir um vognarnar á sjúkrahúsinum, sum stillisliga
koma koyrandi við heilivágnum.
Her kemur heilivágurin,
mítt innanlív, rullandi
á hjólum.

At síggja ommuna koma heim
av bókasavninum við posanum fullum av bókum,
bjargingartiltak,
Dostojevskij og André Gide.
At fara eftir heilvági fyri mammu sína
hjá læknanum og eftir bókum
á bókasavninum,
lækna-bókasavn,
Graham Greene og Marcel Proust,
Kjarni málsins í leitanini eftir horvnu tíðini.

At læna bøkur til sín sjálvs
og stápla tær oman á hvørja aðra niður við seingini,
Ditte menneskebarn, Barndommens
gade, Den gode jord.
At leggja lívið við koddan
og at sova óttaleys,
tí at onnur hava lisið somu bøkur
einaferð í tíðini langt áðrenn eg sjálv var til,
og tey vóru komin ígjøgnum lívið,
høvdu hildið hesi somu bókini í hondini,
og tí høvdu tey eisini hildið í mína hond,
og vit góvu bøkurnar víðari til hvørt annað,
fullar av livaðum lívi,
vit góvu lívið víðari.

At koma á bókasavnið í Slagelse
og biðja um eina bók úr New York:
"Alone, Alone – Lives of some Outsider
Women," um kvinnur, sum spældu ella
sum ikki vildu spæla, soleiðis sum hini vildu hava tær
at spæla.
At vera høvundur og verða keypt
av bókasavninum. At verða vigað og funnin
ov lætt ella ov tung á ummælaraseðlum
og verða lænt út
til fólk, tú ikki kennir.

Nærsýnt og langsýnt
við yvir- og undirbiti.

At hitta lesararnar á bókasavninum,
at vera ein giraffur, sum
øll vilja síggja. Er høvundurin eitt menniskja,
sum tey sjálv, ella er hon eitt
sindur fyri seg? Kanska ein gepardur?

At koma á bókasavnið
og fáa at vita, at Espen Snarre
bygdi kirkjuna í Kalundborg,
at Kingo var hjálparprestur á Sæbygård
og at Antvorskov er største Johanittar-
kleystrið í Norðurlondum.

At koma á eitt bókasavn,
smáar oyggjar av siðmenning,
sum enn verja borg ímóti
Bilka, Kvikly og Remo Túsund.

At vera ein gamal maður
sum fer á bókasavnið
leiðandi eina smágentu.
Hann hevur ongantíð verið har áður,
tað er hon, sum veit vegin.
Alt sítt lív hevur hann lagt vegin undir
í asfalt og betong,
men hann hevur ongantíð verið inni á bókasavninum.
Nú er tað tann fýra ára gamla gentan, sum vísir vegin
og hon blaðar í bókunum,
sum vóru tær næstringar hennara,
hon tosar við, og nú fer
hesin gamli
eisini at tosa,
ja, sjálvt við bókavørðin.
Skap alheimsins
hevur altíð hugtikið hann,
hvussu hava teir hugsað hetta
frá tíðarinnar morgni.
Við sær av bókasavninum
undir arminum
hevur hesin gamli fingið "Søgu heimspekinnar,"
meðan gentan hevur lagt sær
"Kettuna við teimum bláu eygunum"
í reyðu smyrslskjáttuna.

III

At verið eitt lítið hvítt slott handan trøini,
fult av bókum við reyðum, grønum og bláum
bindum við gullbókstavum og numrum á rygginum.
At vera eitt gylt tal á einum ryggi
at vera sett á rað,
at vera ein bók á einum bókasavni
og at hava funnið
sína røttu hill.

At vera eitt bókasavn av Borges,
eitt heimsbókasavn
ella eitt lítið bygdabókasavn í Høng,
sum í sínari varðveitslu hevur handskrivaðu
endurminningarnar
hjá Mads Jensen sóknarfúta, og har
trøllkonurnar á staðnum
kundu fáa hendur á teirri ræðuligu bókini,
hvørs heitið ikki kann berast fram á torg.

Bøkur úr steini,
bøkur úr brendum talvum,
úr pappíri frá trøunum úr skógunum,
bøkur úr papyrus og talgildir
bókstavir og tekn á skíggjum –
talgildir portalar til

Alexandria, Pergamon, Efesos
og Tann svarta diamantin.

At verið ein alheimur
við smáum lágum rimaverkum úr gulli
og spiraltrappu og hýsa
øllum heimsins skráum,
teirri loyniligu bókini við lummaspeglinum,
tí stóru rundu bókini við tí óendaliga
rygginum, sum fer eftir øllum
veggjunum uttan viðmerkingar.

At verið ein alheimur,
bergtikna bókasavn Borges,
skaldið, sum sá, at Mannaættin
fór at doyggja út, men bókasavnið fór at liva.
Upplýst, einsamalt, uttan enda,
á tremur við dýrabarum bindum. Nyttuleyst,
ævigt og loyniligt.

At verið ein alheimur
ein vitanaralheimur við einari vitan
Ad libitum. Neyðars tann, sum í dag er
býttur, nú vitan er alt og vísdómur er
skemt úr onkrari kjallaragoymslu:
Kenn teg sjálvan, var tað onkur, sum segði,
men hann var ljótur og løgin
og hevði vána stíl. Hann kann sleppa at goyma seg
aftanfyri dagblaðið
á lesistovuni, so at hann ikki stirðnar í hel.
Tað, hann sigur, kunnu vit ikki brúka
til nakað sum helst, sjálvt um øll hava atgongd
til málið.
At kenna seg sjálvan er ikki
í staðin fyri nakað annað,
men ein ferðaseðil til tokið, sum er farið.

At verið eitt bókasavn,
sum hýsir øllum tí gloymda,
og minnir okkum á okkurt,
sum nívir.
Men í dag heiðra vit
Bókasøvnini,
sum vóru tey okkara annað heim, fróðskaparrúm
og veðurglas.

Martin Næs týddi

Yrkingin varð skrivað í sambandi við 100-ára dagin hjá Danmarks Biblioteksforening og framborin av yrkjaranum 25. november 2005 í Svarta diamantinum í Keypmannahavn.